SUNDA KOMMUNA

# Lærarastørv við Haldórsvíkar skúla

**Hesi størv verða lýst leys til setanar:**

- 1 fast starv
- 1 tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008, uml. 25 tímar um vikuna

**Søkt verður eftir fólki, sum:**

- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans, skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Duga at samstarva og eru fyrikomandi
- Eru fús at taka á seg uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- Vilja vera við til framhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tey, ið sett verða, skulu sum meginreglu hava læraraútbúgving, eins og ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum. Onnur eru tó eisini vælkomin at søkja.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Tímatalið til tíðaravmarkaða starvið verður ikki endaliga ásett fyrr enn 1. septembur 2007.

**Umsóknir:**
Umsóknir við CV, avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 6. august, kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Nomi Jacobsen, skúlaleiðara, á telefon nr. 422571, ella umvegis teldupost: nomi.jacobsen@skulin.fo.

**Haldórsvíkar skúli**
**440 Haldórsvík**

**Haldórsvíkar skúli** hevur komandi ár uml. 20 næmingar og 3 lærarar. Skúlin er tveir-flokkaður skúli við næmingum í aldrinum 1.-7. flokk.

# Nýtt teoriskeið

Nýtt teoriskeið til koyrikort til persónbil (B) byrjar 1. august 2007

**KOYRIFRÁLÆRA** heldur til á Hoyvíksv. 61, FO-100 Tórshavn

**SP/F KOYRIFRÁLÆRA**
Birgir Andersen · Tlf. 21 60 21

# Starvslýsing

BO Service Sp/f er ein fyritøka í menning og við nógvum avbjóðingum. Í sambandi við vaksandi eftirspurning á arbeiðsmarknaðinum verður søkt eftir royndum fólki til HVS og ventilatiónsarbeiðir, sveisiarbeiðir, smærri maskinumvælingar og annað viðlíkahaldsarbeiði. Vit gera arbeiðir bæði fyri stovnar, virkir og privatfólk.

**Førleikakrøv**

- Vit vænta at tú hevur viðkomandi útbúgving so sum maskinmeistari/skipsmaskinistur, rørsmiðjur e.l.
- At tú ert røkin, fleksibul, hevur góð samstarvsevnir og kann arbeiða sjálvstøðugt
- Ert fúsur at finna nýggjar loysnir og ikki ert bangin fyri nýggjum avbjóðingum

Løn sambært avtalu. Nærri fæst at vita við at venda sær til Boða Olsen á tlf. 521500

**BO Service Sp/f**
Leitisgøta 7 · FO-160 Argir
T-postur: bodi@kallnet.fo
tlf. 321500 · fartlf. 521500



**Heilsufrøðiliga Starvsstovan**

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. +298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIROMENTAL AGENCY

# FRÁBOÐAN UM LOYVI

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan hin 23. juli, við heimild í skrivi frá landsstýrismanninum í umhvørvismálum, dagfest 27. apríl 2007 um at geva Heilsufrøðiligu starvsstovuni heimild at taka avgerð sambært grein 25, stk. 1 í havumhvørvislógini, um nýtslu av evnum og tilfari at basa dálking, hevur givið PE Consulting:

**Avmarkað royndarloyvi til nýtslu av bloytingarevni**

**í sambandi við at basa oljudálking á bryggjukantum, gróti o.ø.**

Loyvið liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 14 dagar frá dags dato.

# Tørvar tær timburmann?

**Ring á tlf. 21 93 18**

**J.T.D. SMÍÐ**

# Leiga av ítróttarhøllini í Runavík

Tey, ið ætla at leiga ítróttarhøllina í Runavík veturin 2007/2008, skulu senda skrivliga umsókn til býráðsskrivstovuna í seinasta lagi 15/8-2007.

**Runavíkar Býráð**

*Óluva á Lofti verður útlært sum blómudekoratør.*

*Í hesum sambandi hava vit brúdleypstema – traditionelt og ótraditionelt – í Vakstrarhúsinum Dáin hósdagin kl. 15.00.*

*Millum annað verður mótasýning við brúðarkjólum og vøkrum bukettum*

***Øll eru hjartaliga vælkomin***

Vakstrarhúsið Dáin
Sandavágur · tlf. 33 23 64

## Handils-/skrivstovuhøli søkist

Sóknast verður eftir minni hølum til handil/skrivstovu í Havn fyri rímiligan kostna. Ynskiligt er at goymslumøguleikar við góðum atkomumøguleikum eru. Hølini mugu liggja væl fyri og hava framsýningargluggar.

**Ring ella skriva til 211996 / kho@post.olivant.fo**

# SUMMARFRÍ

Salongin er stongd frá 30. juli til 20. august.

***Harraklipp í Vágsbotni***

# SUMMARFRÍ

Virkið er í summarfrí frá 23. juli til 13. august

**PLÁTUVERKSTAÐIÐ**
**Tel 32 17 78**